# Ein stuttlig ferð gjøgnum klassiskt og minni klassikt

**Konsertfelagið helt 25 ára føðingardag, við eini minniligari violinkonsert**

UMMÆLI
*Niels Uni Dam*

Kim Sjøgren telist millum bestu violinleikarar í Danmark, og man vera tann stuttligasti av teimum bestu. Hann var vælupplagdur, tá hann aðruhvørja løtu rørdi og hugtók, og aðru hvørja løtu fekk nógvu áhoyrarnar at flenna.

Konsert skráin fevndi um stórar klassiskar tónasmiðir sum Beethoven, Bach, Brahms, Carl Nielsen og nógvar aðrar. Men eisini um tríggjar variatiónir yvir »Åh Susanne« ognað Susanne Brøgger, og eina sera undirhaldandi tolking av »Hønsefødder, Gulerødder«.



*Okkara føroyski klaversnillingur, Jóhannes Andreassen, var gestur hjá Kim Sjøgren. Hann gav framførsluni eitt eyka krydd, heldur Niels Uni Dam í ummælinum*

## Óvanlig framførsla

Ólavur Jacobsen bjóðaði vegna Konsertfelagið vælkomnum. Hann segði frá, at konsertin fór at vera í einum settið, og at Kim Sjøgren fór at spæla so leingi, sum hann tímdi. Eisini visti Ólavur at siga, at Kim fór at hava onkran gestatónleikara við sær, og at hesin kanska visti av tí. Lagt var upp til eina eitt sindur óvanliga framførslu.

Kim Sjøgren legði fyri við at tosa um sín alsk til Føroyar. Hann var fyrstu ferð her fyri 29 árum síðan, og síðan hevur hann vitjað ofta. Hann byrjaði konsertina við nøkrum tónleikapettum hjá Bach, og áhoyrarnir sótu sum rúnarbundnir, tá hann gandaði tónar úr 255 ára gomlu violinini hjá Jóhan Restorff.

Tónleikurin fylti stóra salin í Norðulandahúsinum, og hansara bland av skemti og tónleiki, bergtók ung sum gomul. Hetta var ikki bert ein violinsnillingur, men eisini ein sera stuttligur maður.

## Klappifrálæra

Tá hann hevði spælt ein góðan hálvan tíma, vidi hann hava áhoyrarnar við. Aftan á eina longri og sera undirhaldandi klappifrálæru, luttók allur salurin í einum peppaðum sjampagnu galoppi.

Gesturin hjá Sjøgren var Jóhannes Andreassen. Klaversnillingurin kom á pallin og hetta gav framførsluni eitt eyka krydd, sum lyfti heildarupplivingina.

## Spælt við Brøndby

Eitt av hæddarpunktunum á konsertini var eitt skotsk fólkalag. Sjøgren hevði lært lagið á einari ferð við Brøndby í Skotlandi. Brøndby var í Skotlandi og spældi dyst móti Aberdeen. Kim skuldi við at spæla fyri áskoðarunum áðrenn dystin. Hetta gekk væl. Hjá Brøndby gekk eisini væl, teir vunnu dystin, og so fór alt ferðaliðið á Glenfiddich at hátíðarhalda sigurin. Kim minnist ikki so nógv um, hvat so hendi, men onkursvegna hevði hann lært hetta skotska fólkalagið.

Konsertin endaði við einari herligari tolking av »Hønsefødder Gulerødder« ella rættari fimm tolkingum. Einari vanligari danskari, einari arabiskari, einari amerikanskari, einari russiskari og til seinast eini japanskari, og tá lógvabrestirnir aftur vóru tagnaðir var stilt. Konsertin var liðug, og vit sum vóru har, vóru eina frálíka mentanarupplivingi ríkari.

# Spældi til dans sum barn

**Tá framførslan var av, hitti eg, Kim Sjøgren handan pallin. Vit prátaðu um skeiðið, hann hevði hildið fyri nømingum á musikkskúlanum. Um lívið sum professionellur tónleikari og um hugin til altíð at royna okkurt nýtt**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*

Fríggjadagin helt Kim Sjøgren eitt sokallað Masterclassskeið fyri evnaríkum næmingum á Musikkskúlanum. Hann segði okkum, at allir næmingarnir vóru só evnaríkir, at hann sjálvur fegin hevði vilja havt teir sum næmingar. Næmingarnir vóru bæði gávuríkir og handverksliga væl fyri. Hann bað okkum fegnast um tey góðu úrslitini hjá musikkskúlaskipanini í Føroyum.

Á skeiðnum lærdi hann fyrst og fremst næmingarnar ymiskar teknikkir. Men hann gav teimum eisini ráð um, hvussu ein skuldi bera seg á einum palli, og um hvussu ein fær fanga áhoyraran. Neyðugt er sambært Kim Sjøgren at vera eitt sindur yvirdrivin. Annars missir áhoyrarin áhugan.



*Á Masterclassskeiðinum fríggjadagin lærdi Kim Sjøgren fyrst og fremst næmingarnar ymiskar teknikkir. Men hann gav tgeimum eisini ráð um, hvussu tey skuldu bera seg at á einum palli – og hvussu tú fært »fangað« áhoyrararnar*

## Lívið sum professionellur tónleikari

Kim Sjøgren byrjaði at spæla til dans saman við foreldrunum longu sum barn. Hann hevur sostatt livað sum tónleikari í yvir 40 ár. Hann sigur sjálvur, at hann kann viðmæla lívið sum professionellur tónleikari. Hann hevur upplivað sera nógv, og hitt nógv fólk, og fingið nógvar vinir. Eisini vinir, sum hann ikki dugir at tosa við. Men sum hann kann samskifta við gjøgnum tónleikin.

Men hetta lívið krevur eisini hart arbeiði. Eydnan kemur ikki av sær sjálvum, tú noyðist at vilja tað. Hansara ráð til ungar tónleikarar sum fegnir vilja liva av tónleiki, er: At teir skulu gera av, um teir veruliga vilja stríðast fyri tí, og um so er, so er bara at gera tað.

## Slóðbrótarin Kim Sjøgren

Kim Sjøgren hevur øll árini verið kendur sum ein fjølbroyttur listamaður. Hann hevur spælt nógv ymisk sløg av tónleiki. Spælt við nógvum ymiskum sangarum, tónleikarum, og sjónleikarum. Hevur sjálvur spælt revy og fer í næstum at ferðast við einum sokallaðum »one man show«, har hann við og uttan violin sjálvur skal undirhalda áhoyrarnar í tveir tímar. Hann sigur, at tað er hugurin sum drívir hann til at troyta nýggjar leiðir. Hann heldur, at hann gerst ein betur violinspælari av at royna ymiskt.

## Brúðurin fekk suppu á kjólan

Kim byrjaði at spæla til dans, veitslur og brúðleyp heilt ungur. Her fekk hann nógvar stuttligar upplivingar, sum ta ferðina ein tænari datt og lendið í ísinum sum hann bar, ella tá brúðurin fekk ein tallerk av suppu niðureftir brúðarkjólanum. Hesar upplivangar tók hann við sær á konservatoriðið. Tá hann fór út at spæla klassiskar konsertir, var skemt ein náttúrligur partur av framførsluni. Í byrjanini vóru nógv, sum hildu lítið um hetta. Men tíðarnar hava broytt seg, og fleiri og fleiri hava tikið skemtið til sín.

## Serlig violin

Á konsertini spældi Kim Sjøgren á eina violin hjá Jóhan Restorff. Violinin er gjørd av italiumanninum Guardagnini í 1750. Kim hevur lánt violinina í eitt hálvt ár, tí hann umhugsar at keypa hana. Hann spældi fyrstu ferð á violinina fyri 29 árum síðan, og hann hevur verið bergtikin av henni líka síðan. Hann eigur longu eina violin frá 1745, sum ein annar italiumaður hevur gjørt. Men fyri einum árið síðan breyt Tommy Kenter hana. Hóast hon er umvæld, hevur hon ikki verið líka góð síðan.

Á veg út í tóma konsertsalin, segði Kim, at hann helt Norðurlandahúsið vera eitt framúr konsertstað. Eg kundi bara geva honum rætt, og hugsaði, at um fáar vikur, verður hetta karmurin um Atlantic Music Event.

## Tekniskir trupulleikar við blaðútbering

Vegna umlegging og ymsum tekniskum trupulleikum hevur útberingin av Sosialinum verið eitt sindur svikalig í seinastuni. Vit eru við at finna og rætta brekið og heita inniliga á okkara viðskiftafólk um at bera yvir við okkum. Hetta fer at koma í rætt lag aftur.

**Sosialurin**